

Hetta er ein stórur partur av mínum stíli og image

FAKTA **JÁKUP PAULI G. OLSEN**

**Aldur:** 32 ár
**Bústaður:** Havn
**Tatoveringar:** Fimm
**Fyrsta tatovering tá eg var:** 19 ár

**MYNDIR:** JENS KRISTIAN VANG

# EG ERI FØDDUR ROCK'N ROLLARI

TÁ FÓLK SKULU LÝSA **JÁKUP PAULA GAARD OLSEN**, SIGA TEY HELST: TAÐ ER HANN VIÐ TEIMUM NÓGVU TATOVERINGUNUM. JÁKUP PAULI HEVUR NEVNILIGA FLEIRI OG SJÓNLIGARI **TATOVERINGAR** ENN FLESTU ONNUR. – EG HAVI ALTÍÐ VILJA SÆÐ SOLEIÐIS ÚT, SIGUR HANN.



**KROPSPRÝÐI**

Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Jákup Pauli er í svørtum jakka, hatti og converse-skógvum. Hann hevur reytt skegg og eina piercing í tunguni.

Vit byrja við at taka myndir. Hann letur seg úr, og vísur stoltur armarnir, sum eru tatoveraðir sum »ermar« ella »sleeves«, sum tað verður kallað.

Høgri armur er liðugur, og vinstri er komin hálvegis. Litir skulu bara fyllast í.

– Tað tekur nokk eini 15 tímar afturat, til armurin er heilt klárur, sigur Jákup Pauli, sum sama kvøld vit hittast, skal út til tatovørin Michael Lomholt í Yndi at halda áfram við tatoveringini av arminum.

Jákup Pauli hevur fyriuttan armarnar eisini tatovering á búkinum og á beininum.

Tatoveringarnir á ørmunum eru av monstrum og óndum klovnum.

– Mær dámar væl 1950-ara horror, sigur hann.

Ein, sum tó er alt annað enn ræðuligur, er Homer Simpson, sum Jákup Pauli hevur á vinstra beininum.

– Eg hevði hug at gera Homer til ein fótbóltshooligan, sigur hann og flennur.

Jákup Pauli er heilt vísur í, at hann ongantíð fer at angra sínar tatoveringar. Hann hevur umhugsað tær væl, áðrenn hann fór ígongd við tær.

– Hetta er ein stórur partur av mínum stíli og image, sigur hann.

At tatoveringarnar skulu gerast ein trupulleiki, tá hann eldist, trýr hann ikki uppá.

– Eg verði gamal og rukkutur við ella uttan tatoveringar. Tað ger akkurát tað sama, sigur hann og suffar eitt sindur – eg eri neyvan tann fyrsti at seta henda spurning.




*Homer sum hooligan á beininum hjá Jákup Paula*

Eg hevði hug at gera Homer til fótbóltshooligan

**Fer tú at fáa tær fleiri tatoveringar?**
– Ja, fyrst skal vinstri armur gerast liðugur. Síðan er ætlanin at tatovera ryggin, leggirnar og kanska eisini bringuna.

**Hevur tú nøkur mørk?**
– Eg kundi ikki hugsa mær at tatovera andlitið.

▶